

– Vandin er, at hetta er ein skrúva uttan enda, og at vit ikki koma á mál, men eg havi mót um, at tað fer at bera til at finna fram til hann. Nú hava vit brúkt so nógva tíð og orku, at vit skulu eisini taka tey seinastu tøkini á mál, sigur Regin Joensen

MYND: JENS KRISTIAN VANG

hjálpa, og tað gevur vónir um, at tað fer at eydnast at finna Terry Patrick.

## Stóra forðingin

Største forðingin fyri at finna fram til rætta Terry Patrick er, at eingin kennir føðingardagin hjá honum. Terry Patrick kom til Føroya óskrásettur við einum fiskiskip, og ongastaðni í Føroyum er hansara føðingardagur skrásettur. Tá ið tað finnast hundraðtals – ja, kanska túsundtals – Terry Patrick, kann tað vera sera trupult – og higartil ógjørligt – at finna fram til rætta mannin, um tú ikki kennir føðingardagin.

Ein vón er tó framvegis um at finna føðingardagin hjá Terry Patrick, og tað er tí, at hann var til avhoyringar á politistøðini í Havn einaferð, tí hann hevði ikki arbeiðsloyvi. Ein møguleiki er, at føðingardagurin hjá honum er skrásettur í tí sambandi, men higartil hevur tað ikki eydnast at finna nakað skjal um avhoyringina.

– Høvdu vit havt føðingardagin hjá honum, hevði tað verið nógv lættari at leita eftir honum í Onglandi, sigur Regin Joensen.

Ein vansi við leitingini í Onglandi er, at har er einki sentralt fólkayvirlit, og tí má leitast á nógvum yvirlitum kring landið. Terry Patrick er ættaður úr Birmingham, men møguliga býr hann onkra heilt aðrastaðni, og í Onglandi hevur ikki verið skrásett, hvagar eitt fólk fer, tá ið tað meldar seg frá fólkayvirlitinum í einum býi.

## Meðan hann livir

Terry Patrick er í 60 árunum nú, og Regin Joensen viðurkennir, at tað er nú, at hann skal finna pápa sín, um hann skal geva sær vónir um at finna hann á lívi.



Royal Danish Embassy
67 Pont Street
LONDON S.W.1

38 Stanfield Road
Quinton
BIRMINGHAM 32

April 3rd 1967

Reference 21.STB.8./172

Dear Sir,

By reference to your letter of the 31st inst, I can only tell you that, Terry Patrick is in Europe, and that his address is ,at present, unknown to me.

As I am his father, and have to controll any business that concerns him, whilst he is absent, and until his return, please communicate with the undersigned, at the above address, and I will attend to the matter if it is within my power.

Yours faithfully,

A.J.Patrick.

Hetta skrivið kom til Føroya, tá ið roynt var at finna fram til Terry Patrick í sambandi við faðirskapssakina

– Eg eri eitt sindur beiskur um, at hann ongantíð hevur roynt at sett seg í samband við meg, men eg kenni ikki hansara søgu og hansara bakgrund, og eg veit ikki, hvat tað er, sum hevur gjørt, at hann ikki hevur leitað eftir mær. Tað kundi eg hugsað mær at fingið at vita, sigur Regin Joensen.

– Eg haldi, at tað er frægari at vita, hvussu umstøðurnar eru – sjálvt um tær kanska ikki eru positivar – enn ikki at vita. Eg kundi hugsa mær at loyst loyndarmálið, sum eg eri føddur við, sigur hann.

Regin Joensen sigur, at hann hevur viðurkent fyri sær sjálvum, at søgan ikki endiliga endar positivt, men ta er ein partur av sakini.

– Vandin er, at hetta er ein skrúva uttan enda, og at vit ikki koma á mál, men eg havi mót um, at tað fer at bera til at finna fram til hann. Nú hava vit brúkt so nógva tíð og orku, at vit skulu eisini taka tey seinastu tøkini á mál, sigur Regin Joensen.



Terry Patrick vaks upp í hesum húsunum í Birmingham

## Av landinum at leita

Higartil hevur leitingin eftir Terry Patrick givið ymsar upplýsingar. Skjøl eru funnin um hann, fólk minnast hann frá tíðini í Føroyum, og tað er greitt, at hann fór til Íslands eftir tíðina í Føroyum. Har spældi hann eisini í tónleikabólki.

– Næsta stigið hjá okkum má vera at fara av landinum at leita. Vit hava fyri tað mesta leitað úr Føroyum – og hava so havt fólk uttanlands at hjálpa okkum – men vit mugu nokk av landinum fyri at koma víðari, heldur Regin Joensen.

– Hetta hevur stóran týdning fyri meg, og tað er neyvan nakar dagur, har eg ikki hugsi ein tanka um pápa mín. Og um nakar kann hjálpa mær ávegis hevði eg verið sera fegin. Allar upplýsingar kunnu hjálpa okkum, sigur hann.